# Fegnast um oljuútbjóðingarlóg

*Stjóri og nevndarformaður í teimum báðum privatu føroysku oljufeløgunum, Atlants Kolvetni og Føroya Kolvetni halda, at tað var rætt ikki at taka alment oljufelag ella optión við í útbjóðingarlóg*

JAN MÜLLER

Nú løgtingið við 2. viðgerð hevur samtykt uppskotið frá landsstýrinum til oljuleiting hevur blaðið roynt at fáa onkrar viðmerkingar frá oljufeløgum, sum eru hugað í Føroyaøkinum. Tey vit hava tosað við vilja bíða at gera viðmerkingar til uppskotið er endaliga samtykt og 1. útbjóðingin alment er latin upp. Kortini hevur tað eydnast at fáa umboð fyri tey bæði føroysku oljufeløgini at gera viðmerkingar.

Graham Steward, nevndarformaður í Føroya Kolvetni er fegin um, at løgtingið hevur samtykt upprunaliga uppskotið. Sjálvur heldur hann tað vera gott fyri komandi útbjóðingina, at hvørki alment oljufelag ella optión er við. -Kappingin er ómetaliga hørð. Føroyar skulu kappast við útbjóðingar í Brasilia og Vesturafrika, og tí má man ikki gera støðuna torførari fyri eina føroyska útbjóðing við at taka alment oljufelag ella optión við.

Graham Steward heldur ikki føroyingar missa nakað við ikki at hava optión við. -Føroyingar skulu fáa nakað burtur úr gjøgnum skattin, við at veita tænastur til vinnuna og við at vera við í føroyskum oljufelag.

Formaðurin í Føroya Kolvetni dylur annars ikki fyri, at sjálvt um verandi uppskot verður samtykt, so er serskattaparturin ov tungur. -Eg haldi har skuldi als ikki verið nakar slíkur, men hetta er so ein avgerð hjá føroyingum. Ein má bara gera sær greitt, at ein avleiðingin kann blíva, at fleiri feløg ikki verða við í útbjóðingini, tí tey meta skattin ov høgan.

Graham Steward, sum starvast sum stjóri í oljufelagnum Dana, búleikast nógv millum oljufólk, og tað er hansara meting, at tað verða í minsta lagi 3 feløg, sum ikki verða við í útbjóðingini, ið higartil hava víst áhuga. -Eg rokni við, at tað kanska vera í mesta lagi 10 oljufeløg við í útbjóðingini, tá avtornar. Graham Steward sigur seg annars vera nøgdan við, at tað ikki verður lóggivið um, at alt oljuvirksemi bara skal liggja á einum ávísum plássi, hóast hann sigur seg væl skilja, at suðuroyingar eru vónsviknir. Hann heldur tó, at tað skuldi verið nokk til allar, tá avtornar.

**Atlants Kolvetni**

Stjórin í Atlants Kolvetni, Wilhelm Petersen er eisini nøgdur, nú tingið hevur samtykt upprunaliga uppskotið frá landsstýrinum, sum hann heldur er eitt sera gott og væl gjøgnumarbeitt uppskot. Hann heldur ikki, at tað er nakað bakkast fyri Føroyar, at alment oljufelag ella optión ikki kom við. Hann heldur, at samfelagið peningaliga fær mest burtur úr við tí skattaskipan, sum er ásett í uppskotinum.

-Tað almenna skal seta karmarnar, meðan tað privata skal reka vinnuvirksemi. Hetta er tíanbetur tann gongdin, sum vit síggja í Føroyum í dag.

Wilhelm Petersen er eisini nøgdur við, at broytingaruppskotið at leggja alt oljuvirksemi til Suðuroynna fall. Hann heldur, at alt tað føroyska vinnulívið og eisini Suðuroyggin skulu vera við í útviklinginum. Allir skulu hava sama møguleika til at vera við.

Stjórin í Atlants Kolvetni er ikki samdur við Graham Steward í hinum føroyska oljufelagnum, tá prátið kemur inn á serskattin. -Serskatturin kemur bert inn í myndina, tá man hevur sera høgan prís og sera stór felt. So hetta verður ein luksustrupulleiki. Tá hava oljufeløgini fingið eitt gott avkast, og við serskattinum tryggjar tú tær, at oljufeløgini ikki fara avstað við øllum. Wilhelm Petersen sigur, at treytirnar vit seta oljufeløgunum mugu ikki verða ov harðar, soleiðis at eingin áhugi verður fyri at leita her. -Eftir míni meting er verandi lóg í tráð við hesa sannroynd, og alt í alt er uppskotið til oljuleiting skilagott og til gagns fyri Føroyar.

## Samd um barnafrádrátt

EIRIKUR LINDENSKOV

Ein samd fíggjarnevnd tekur undir við uppskotinum hjá Krisiani Magnussen um at broyta skattalógina soleiðis, at barnafrádrátturin eisini skal galda fyri børn millum 16 og 18 ár.

Kristian Magnussen segði, tá hann legði uppskotið fram 20. januar, at hetta var fyri at lætta um hjá barnafamiljum. Eisini segði hann, at samfelagið er so nógv broytt síðani reglan um, at barnafrádrátturin bert skal umfata børn undir 16 ár kom i gildi í 60'unum.

Hann vísti á, at børnini ganga longri í skúla í dag, og at vit eisini hava kravda 9 ára skúlaskyldu, og tá verða tey ungu 16-17 ár áðrenn tey eru liðug við skúlan.

Undir viðgerðini hevur fíggjarnevndin havt fund við Karsten Hansen, landsstýrismann í fíggjarmálum, umboð fyri Fíggjarmálastýrið og Toll- og Skattstovu Føroya.

Frá Toll- og Skattstovu Føroya hevur nevndin fingið yvirlit yvir kostnaðin av at hækka aldurin fyri barnafrádrátt til 18 ár. Yvirlitið vísir, at verður aldurin fyri barnafrádrátt hækkaður til 18 ár verða 1238 børn afturat fevnd av lógini, og samlaði kostnaðurin er 8.706.200 krónur.

## Harmonikutreff í Vágum

*Einir 40 harmonikuleikarar fara at spæla í Vágum um vikuskiftið. Allur peningurin, sum kemur inn leygarkvøldið fer til at fáa SÍ-húsið liðugt til fótbóltskappingina í ár*

ÓLAVUR Í BEITI

Um vikuskiftið verður Harmonkutreff í Vágum, og ætlanin er at harmonikuleikararnir skulu rættiliga gera vart við seg. Verður veðrið til vildar fara leikararnir at spæla úti í Miðvági, Sandavági og Sørvági og verður hetta klokkan 15.00 leygardagin.

Seinni sama dag, klokkan 23.00, verður so stóri dansurin í Sørvági, har allur innkomin peningur fer til at fáa SÍ-húsið liðugt.

Harmonikuleikararnir skulu gista á Sørvágs Skúla og ætlanin er so eisini at teir fara at venja og hugna sær, meðan teir eru í Vágum, og tá eru eisini vælkomnir harmonikuleikarar úr allari oynni, verður sagt frá SÍ.

Allir heimadystir hjá FS-Vágum skulu spælast á vøllinum í Sørvági í ár, og tí er sera umráðandi at fáa nýggja bygningin hjá SÍ lidnan til tíðina. Og sum skilst á umboðum fyri SÍ, er brúk fyri nógvari og góðari arbeiðshjálp at fáa SÍ-húsið liðugt, tó at dugnaligir og trúgvir stuðlar eru so at siga hvønn dag í húsunum og arbeiða.

RIMMAR ÚTSØLA



SIEMENS
Vaskimaskina
WP81000
• 1000 umf.
• Top-Loader
• Max 4,5 kg.
• Fuzzy-kontrol
• Restfuktigheit 61% v/1000 umf.
• Við 60° bummull-vask: 59 ltr. vatn -1,0 kWh - 120 min.
Fyrr 8.295,- NÚ 5.490,-



CARAVELL
Frystiboks
CL350 Lágorka
• Netto: 326 ltr.
• Frystiorka um samdøgrið: 22,0 ltr.
• 2 kurvar
• Ljós innan
• Hædd: 895 mm.
• Djúbd: 645 mm.
• Breidd: 1280 mm.
• Orkunýtsla um samdøgrið:1,00 kWh
• Orkunýtsla í eitt ár: 365 kWh
SERLIGT TILBOÐ HESA VIKUNA
Fyrr 4.695,- NÚ 2.900,-



Sosialurin - 311820

gorenje
Komfýrur HE142
• 4 kókiplátur: 2x14,5 og 2x18,0
• 1 bakipláta, 1 skuffa og 1 rist
• Trad. ovn: yvir- og undirvarma
• Clean emalja
• Hædd: 850 (+25) mm.
• Breidd: 600 mm.
• Dýpd: 600 mm.
• Orkunýtsla: 9,5 kWh
Fyrr 5.195,- NÚ 3.490,-



Míele
Turkitrumla
Fyrr 8.195,- NÚ 6.895,-
Uppvaskimaskina
Fyrr 8.195,- NÚ 6.895,-
Vaskimaskina
Fyrr 11.795,- NÚ 9.795,-



Lec
Køli-og frystiskáp T062W
• Netto innihald: Køl 198 ltr. Fryst 143 ltr.
• Vendbarar lúkar
• Sjálv-virkandi avríming í køl
• Hædd: 1888 mm.
• Breidd: 598 mm.
• Dýpd: 620 mm.
• Orkunýtsla um samdøgrið: 1,60 kWh
• Orkunýtsla í eitt ár: 584 kWh
Fyrr 9.195,- NÚ 5.490,-

HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi - FO 110 Tórshavn - Tel. 314949 - Fax 311330 - E-mail: hthdul@post.olivant.fo



# Biðja um eykajáttan til Strandferðsluna

*Vinnumálastýrið heldur seg einki annað val hava uttan at biðja løgtingið um fleiri pengar til Strandferðsluna*

EYÐUN KLAKSTEIN

Tað er eingin onnur loysn á trupulleikunum á Strandferðsluni enn at lata stovnin fáa fleiri pengar.

Tað heldur Vinnumálastýrið, sum í løtuni fyrireikar eitt uppskot um eykajáttan til Strandferðsluna.

Málið hevur skund, og tí verður uppskotið lagt fyri tingið um stutta tíð.

– Tað er óheppið at skula biðja um eykajáttan, tá fíggjarlógin júst er samtykt, men vit hava einki val. Tað ber ikki til at loysa uppgávuna hjá Strandferðsluni við verandi játtan, sigur Hákun Steingrímson, leiðari á samferðsludeildini í Vinnumálastýrinum.

– Vit mugu tryggja SL nóg mikið av pengum til at gera umvælingar og at leiga skip, tí annars kann stovnurin ikki loysa sína uppgávu, sigur hann.

Enn er krónutal ikki sett á eykajáttanina, men Hákun Steingrímson roknar við, at upphæddin fer at liggja um sjey milliónir krónur.

**Kanna stovnin**

Løgtingið noktaði annars í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógini at lata Strandferðsluni fáa 10 milliónir eyka í ár 2000.

Strandferðslan fekk tríggjar milliónir, og so varð lagt upp til, at stovnurin skuldi spara hinar sjey milliónirnar.

Men nú sleppa tingmenn enn einaferð at taka støðu til tær sjey milliónirnar, sum Strandferðslan manglar í ár.

– Saman við uppskotinum fara vit eisini at leggja eitt upplegg um, hvussu vit kunnu gera sparingar á Strandferðsluni. Trupulleikin er, at vit kunnu ikki gera so stórar sparingar eftir einum ári. Onkrar sparingar kunnu gerast beinanvegin, men nógvar krevja tíð, sigur Hákun Steingrímson.

Vinnumálastýrið ætlar at endavenda Strandferðsluni og lýsa øll viðurskifti á stovninum í eini nýggjari frágreiðing, sum væntandi verður gjørd í ár.

Men hvørki hendan frágreiðing ella viljin til at gera sparingar fáa loyst trupulleikarnar á Strandferðsluni, sum gerast alt meira átrokandi. Fleiri pengar mugu játtast til stovnin, heldur Vinnumálastýrið.

# Avmarkað atgongd

*Ferðslan um Vestmannasund er órógvað av, at Sam og Ternan I ikki kunnu sigla sum ferðamannaskip. Suðroyingar, sum høvdu verið á flogi týsdagin, strandaðu í Havn*

EYÐUN KLAKSTEIN

Í gjár og fyrradagin var óskil á ferðsluni um Vestmannasund.

Sjóvinnustýrið tók mikudagin loyvi frá Sam og Ternuni at sigla sum ferðamannaskip. Hetta tí, at skipini ikki høvdu skaffað sær GMDSS, sum tað annars varð kravt, at tey skuldu hava áðrenn 1. februar.

Seinastu tveir dagarnar hava strandferðsluskipini tí siglt sum farmaskip, og tá kunnu tey bert taka 12 ferðafólk.

Hetta hevði við sær, at fráferðirnar hjá Atlantsflog og Maersk úr Vágum fyrrapartin í gjár vóru seinkað í ein hálvan tíma, tí ferðafólk bíðaðu eftir farti. Øll ferðafólkini komu tó við flogførunum.

**Sluppu ikki til Suðuroyar**

Týskvøldið vóru ferðafólkini frá flogfarinum seinkað, og fólk, sum skuldi til Suðuroyar, strandaðu í høvuðsstaðnum.

Ein teirra var Uni Mortensen, sum rekur Gistingarhúsið í Øravík.

– Vit vóru 20 minuttir ov sein til Havnar, men tað var ikki gjørligt at fáa Smyril at bíða, sjálvt um Strandferðslan sjálv hevði skyldina av seinkingini. Tað haldi eg verða ov vánaligt, sigur hann.

Hann og eini 10 onnur ferðafólk, sum skuldu til Suðuroyar týskvøldið, gistu í Havn, og tey sluppu av Havnini klokkan 14.00 í gjár.

– Tað vóru fleiri útlendingar, sum skuldu til Suðuroyar, men Strandferðslan hevði ikki hug at skipa fyri innivisti í Havn, og tí mátti eg hjálpa hesum fólkum. Tað bar ikki til at finna nakran ábyrgdarpersón á Strandferðsluni, sum kundi loysa trupulleikan, sigur Uni Mortensen.

**Í rættlag**

Tá blaðið fór til prentingar í gjár, vóru viðurskiftini við Sam og Ternuni ikki komin upp á pláss, men tá vit tosaðu við Magnus Magnussen, tekniskan leiðara á SL, fyrrapartin í gjár, roknaði hann við, at trupulleikin varð loystur í gjár.

Hann segði, at neyðuga útgerðin var umborð á skipunum til tíðina, men at nú var trupulleikin ein sýningarspurningur.

Fólk bíðaðu bæði á Oyragjógv og í Vestmanna fyrrapartin í gjár, hóast bæði Sam og Ternan sigldu í pendulfarti.





*Ternan og Sam hava seinastu tveir dagarnar bara havt loyvi at taka 12 ferðafólk, og tað hevur órógva samfersluna*

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo

Heimabio
STATOIL
Nýggir filmar hvørja viku
Sosialurin - 311820



FAMILIE TERAPI



BRIDE OF CHUCKY



NÅR GODTFOLK KOMMER TIL BYEN



ARLINGTON ROAD

**Leiga videofilmar á hesum støðum:**
Statoilstøðin í Gundadali tel. 314770
Statoilstøðin í Kollafirði tel. 421083
Statoilstøðin í Saltangará tel. 449133
Statoilstøðin í Klaksvík tel. 457353
Statoilstøðin í Sørvági tel. 332001
Statoilstøðin í Sørvági tel. 332001
Statoilstøðin í Leirvík tel. 443360
STATOIL
støðirnar kring landið